# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Tað er sera gott at frætta, at Time hevur valt Putin til Ársins Persón. Tað er ein stór viðurkenning*
*(russiskur talsmaður)*

# Hillary slept teimum stóru orðunum

**Hillary Clinton og tey, sum standa fyri valstríði hennara, eru ikki so vís í at vinna uppstillingina longur**

Fyri fáum mánaðum lá Hillary Clinton á odda í statinum Iowa, har uppstillingarval verður tann 3. januar. Men soleiðis er ikki longur. Nú siga kanningarnar, at Barrack Obama fær 33 prosent av atkvøðunum har og Hillary Clinton 29. Triðja valevnið, John Edwards, fær 20 prosent.

Tey, sum hava gjørt kanningina, siga, at ein ávís óvissa er, og at tað í veruleikanum merkir, at tað stendur á jøvnum millum Obama og Hillary Clinton. Fyri Hillary Clinton merkir tað, at hon hevur mist nógvar stuðlar í Iowa í seinastuni, og tey, sum fyrr í ár søgdu, at eingin kundi vinna á henni, eru ikki so vís í tí longur.

Eygleiðarar siga, at tað hevur stóran týdning at vinna tað fyrsta uppstillingarvalið, tí tað ávirkar veljararnar í teimum statunum, sum koma aftaná. Longu tann 8. januar verður uppstilling í New Hampshire, og tey, sum leggja valstríðið hjá Hillary Clinton til rættis, royna longu nú at benda orðaskiftinum tann vegin, at tað er ikki tann stóra vanlukkan, um hon tapir í Iowa. Sjálvt maður hennara kennir seg ikki so sigursvísan longur.

- Eg helt ongantíð, at hon var veruliga á odda í Iowa, og eg væntaði ongantíð, at hon fór at vinna har. John Edwards kann vinna í Iowa, segði Bill Clinton í gjár.



*Hillary Clinton er ikki so sigursvís nú sum fyri bara fáum mánaðum síðani*

*(Mynd: AP)*

**Taparin tapir**

Amerikanskir valserfrøðingar siga, at fyri Hillary Clinton er tað ikki avgerandi, at hon tapir í Iowa, men tað skal bara helst ikki vera Barrack Obama, sum vinnur. Tí vinnur Obama, kann hann gerast ein størri hóttan enn John Edwards, tá saman um kemur.

- Vinnur Barrack Obama í Iowa, fer sigursbarometrið hjá Hillary Clinton í botn. Eftir mínum tykki er tað ikki avgerandi, hvør vinnur í Iowa, men hvør tapir, sigur professarin Andrew E. Smith á lærda háskúlanum í New Hampshire við blaðið The Examiner.

# Deyðadømd mamma fekk 14 dagar afturat saman við børnunum

**Ein 27 ára gomul kvinna skuldi takast av døgum í Iran í gjár, men sleppur at liva tvær vikur afturat**

Tann 27 ára gamla Rahele Zamani er dømd til deyða, tí hon drap mann sín. Hon stóð á listanum yvir tey, sum skuldu avrættast í einum fomgsli í gjár, men í síðstu løtu varð navn hennara tikið av listanum. Tað merkir, at hon væntandi sleppur at liova 14 dagar afturat, sigur mannarættind astíðsmaðurin Mahmood Amiry-Moghaddam við norsku tíðindastovuna NTB.

Undir rættarmálinum kom fram, at maður Rahele Zamani fór illa við henni og bukaði hana javnan, og at hon sá sær eingi onnur ráð enn at beina fyri honum. Kortini bleiv hon dømd til deyða.

Í síðstu viku prentaði iranska blaðið Etemad eitt bræv frá teirri deyðadømdu kvinnuni, har hon bað um at fáa avrættingina útsetta, so hon kann vera saman við børnunum, sum eru trý og fimm ára gomul. Nú hevur hon fingið 14 dagar afturat saman við teimum, men Mahmood Amiry-Moghaddam sigur við NTB, at deyðadómurin stendur við.

## STUTT SAGT

### Minni dálkandi bilar

Eitt nýtt uppskot hjá ES-nevndini sigur, at aftan á 2012 skal eingin bilur lata meiri enn 120 gram av $CO_2$ út ígjøgnum útstoytið fyri hvønn kilometur, sum hann koyrir. Stavros Dimas, umhvørviskommiserur, heldur, at uppskotið er gott, men tað halda ikki øll. Í Týsklandi bera politikarar ótta fyri, at uppskotið fer at raka landsins bilar meinari enn bilarnar í øðrum londum, tí í Týsklandi eru lutfalsliga nógvir tungir bilar. Hinveginhaldaumhvørvisverndarfelagsskapir, at uppskotið er ikki nóg avmarkandi og verjir tí ikki umhvørvið so væl, sum felagsskapirnir kundu hugsað sær.

### Fýra tiknir av døgum

Ein maður, sum var funnin sekur í at hava neyðtikið 15 ungfólk, varð í gjár avrættaður í einum fongsli í Iran. Hann varð hongdur, og somu revsing fingu tríggir aðrir menn, sum vóru dømdir til deyða fyri dráp, skrivar iranska tíðindastovan ISNA. Eygleiðarar siga, at tað er vorðið alt meiri vanligt í Iran at døma fangar til deyða og at fullføra revsingina. Sambært ISNA skuldu trý onnur fólk takast av døgum í gjár, men tær avrættingarnar vórðu útsettar fyribils.

### Brúka minni orku

Í Danmark hava myndugleikarnir fleiri ferð skipað fyri átøkum, sum skulu fáa fólk at spara orku í gernadisdegnum, og nú er líkt til, at átøkini hava havt sína ávirkan. Í hvussu er vísir tað seg, at danir brúktu munandi minni orku níggju teir fyrstu mánaðirnar í ár enn sama tíðarskeið í fjør. Minkingin var 6,3 prosent. Úrslitið er, at danir hava brúkt væl minni nátúrgass og kol í ár enn í 2006, meðan oljunýtslan er lítið minkað. Ein orsøk er, at árið í ár hevur verið væl lýggjari enn árið í fjør, sigur Orkustýrið í einari fráhreiðing um orkunýtsluna hjá dønum.